# Gongur væl í Sørvági

**SØRVÁGUR** Tað gongur væl hjá Sørvágs kommunu, og fíggjarliga er kommunan rættiliga væl fyri við eini nettoskuld sum svarar til umleið ein triðing av árligu skattainntøkunum

Vilmund Jacobsen


BORGARSTJÓRIN

Virkandi borgarstjórin í Sørvágs kommunu, Jóhan F. á Ørg, letur væl at gongdini í síni kommunu, sum umfram Sørvág, eisini fevnir um Mykines, Bø og Gásadal.

Hann sigur, at fólkatalið í kommununi liggur um 1100, harav stívliga 1000 fólk búgva í Sørvági og hini smáu 100 í teimum trimum bygdunum.

– Undan kreppuni í nítiárunum var fólkatalið í Sørvági eisini stívliga 1000, men endaði heilt niðri á 960-970. Nú er tað so við tíðini komið upp um aftur tey 1000.

### Gongur væl

Jóhan F. á Ørg sigur, at skattainntøkurnar hjá kommununi eisini hava verið støðugar, nú kreppa annars hevur rakt nakrar kommunur, sum hava staðfest minkandi skattainntøkur.

*– Nettoskuldin hjá okkum verður einar 8-9 miljónir krónur, tá árið er liðugt, og tað er umleið ein triðingur av árligu skattainntøkunum, sigur Jóhan F. á Ørg, virkandi borgarstjóri í Sørvágs kommunu*

**Vit vænta, at samlaðu skattainntøkurnar hjá Sørvágs kommunu í ár helst fara at liggja um slakar 30 miljónir krónur**

JÓHAN F. Á ØRG

Men soleiðis er ikki í Sørvágs kommunu.

Borgarstjórin sigur, at skattainntøkurnar eru ikki minkaðar, men tær eru heldur ikki vaksnar stórvegis.

Jóhan sigur, at skattainntøkurnar í 2009 vóru á leið tær somu sum í 2008, og líkt er ikki til, at inntøkurnar í ár verða minni enn í 2009.

– Vit vænta, at samlaðu skattainntøkurnar hjá Sørvágs kommunu í ár helst fara at liggja um slakar 30 miljónir krónur.

Sørvágs kommuna hevði størri skattainntøkur í juni í ár enn í juni í fjør, og hetta merkir so eisini, at tað eru mánaðir, sum í ár eru størri enn í fjør.

– Nettoskuldin hjá okkum verður einar 8-9 miljónir krónur, tá árið er liðugt, og tað er umleið ein triðingur av árligu skattainntøkunum, sigur Jóhan F. á Ørg.

### Nógv gjørt

Borgarstjórin sigur, Sørvágs kommuna hevur gjørt nógv seinastu árini, men størsta verkætlan í løtuni er musikskúlin og takið á svimjihøllini, sum nú verður skift.

– Vit hava gjørt ymisk onnur arbeiði, og vit hava eisini asfalterað nokso nógv, bæði í Sørvági og í smáu bygdunum, sum eru partur av kommununi. Haraftrat gera vit eitt stórt laðingararbeiði fram við vegnum úr bygdini og út á Bakka í Sørvági, sum veruliga kemur at síggjast aftur, tá tað er liðugt, sigur Jóhan F. á Ørg, virkandi borgarstjóri í Sørvágs kommunu.

vilmund@sosialurin.fo



# Góðir karmar um tónleikalív

**TÓNLEIKALÍV** Tá summarfrítíðin er liðug, verður eisini nýggi musikskúlin í Sørvági liðugur. Musikskúlin, sum áður bara var gamli skúli í bygdini, er nú útbygdur og trífaldaður í stødd, samstundis sum gamli skúli er settur í stand og fer at verða brúktur til konsertir og framførslur

Vilmund Jacobsen

Størsta einstaka íløgan hjá Sørvágs kommunu í hesum árinum er útbyggingin av musikskúlanum í bygdini. Skúlin hevur húsast í gamla skúla, men við skúlaársbyrjan í heyst verða umstøðurnar hjá tónleika-og mentanarlívinum í bygdini og í oynni í síni heild nógv betraðar.

Í november mánaða í fjør tók Sørvágs kommuna støðu til innkomin tilboð upp á arbeiði til nýggjan tilbygning og ístandseting av gamla skúla.

Tað var byggifelagið Trøðhamar í Vágum, sum hevði lægsta boð og fekk til uppgávu at fremja hesa verkætlan í verki. Tilboðini, sum komu inn, løgu úr stívliga 1,5 miljónum krónum upp í stívliga 2 miljónir krónur.

Trøðhamar bjóðaði sær at gera arbeiði fyri 1.544.000 miljónir krónur, men aftrat hesum kemur so ymiskt annað, sum eisini hongur uppi í hesi bygging, sum er nokso serstøk.

### Fyrimyndarligt arbeiði

Jákup Súni Lauritsen, sum er formaður í teknisku nevnd hjá Sørvágs kommunu, er eisini formaður í bygginevndini aftanfyri hesa verkætlan.

Hann sigur, at samlaði kostnaðurin av musikskúlanum fer at liggja millum 3 og 4 miljónir krónur.

– Bygginevndin hevur fylgt væl við verkætlanini, og vit hava havt fundir umleið 14. hvønn dag. Vit halda, at Trøðhamar hevur gjørt eitt fyrimyndarligt arbeiði.

Jákup Súni sigur, at musikskúlaverkætlanin í Sørvági er serstøk, nú gamli skúli verður settur í stand við eitt nú flagtekju, samstundis sum nýggi og størri parturin av bygginini skal fella inn í umhvørvið.

– Gamli skúli verður konserthøll, har pláss verður fyri umleið 100 fólkum, meðan nýggi parturin verður ymisk venjingarhøli og onnur høli. Vit hava havt Jóhannes Steingrund at hjálpa okkum við akustisku viðurskiftunum, bæði í gamla skúla og í byggingini í síni heild, soleiðis at ljóðviðurskiftini verða so góð sum gjørligt. Hetta merkir, at valið av tilfari eisini er gjørt hareftir. Haraftrat hava vit havt listarmannin, Pól Skarðenni,